Kappingareftirlitið

Advokatskrivstovan
Frúutrøð 4
Postboks 6
110 Tórshavn

**Att: Christian F. Andreasen, adv.** **Tórshavn 21. Juli 2016**

Mál. nr.: 16/00215
Viðgjørt: S.R.

**Góðkenning av yvirtøkuni hjá P/f Bakkafrost av P/f Faroe Farming**

Kappingareftirlitið fekk tann 30. juni 2016 fráboðan um, at P/f Bakkafrost hevði í umbúnað at keypa 51% av P/f Faroe Farming. Eftir hesa avhending er Bakkafrost-samtakið einsamallur eigari av P/f Faroe Farming.

Talan er um eina yvirtøku eftir §13, stk. 1 nr. 2 í kappingarlógini, tí ræðisbroyting fer fram og yvirtøkan kemur undir fráboðanarskylduna í §16, stk. 1, tí markvirðini í §14, stk. 1, nr. 2 eru nádd. Sambært ásetingini skal tílík transaktión fráboðast, um ein av luttakandi fyritøkunum hevur ein umsetning á 75. mió. kr. í Føroyum og minst ein av luttakandi fyritøkunum skal hava ein umsetning á 75 mió. kr. á heimsstigi.

Kappingarráðið hevur tvær ferðir tikið støðu til samanleggingar innan alivinnuna. Fyrstu ferð var í 2009 tá ið P/f Bakkafrost og P/f Vestlax Holding vóru løgd saman[1]. Seinni ferð var tá ið Bakkafrost yvirtók P/f Havsbrún[2]. Í báðum førum var viðkomandi marknaðurin fyri aldan laks skilmarkaður til at verða alheims marknaðurin fyri aldan laks.

Í báðum førum bleiv transaktiónin góðkend, tí P/f Bakkafrost fór ikki at fáa eina marknaðarráðandi støðu á globala marknaðinum fyri aldan laks. Tað vóru tó treytir settar í sambandi við aðrar innanlands marknaðir.

Í sambandi við hesa yvirtøku er bara ein viðkomandi marknaður, t.e. søla av aldum laksi. Kappingareftirlitið sær onga orsøk til at hava aðra landafrøðiliga skilmarking, enn hana sum Kappingarráðið longu hevur brúkt tvær ferðir.

Talan er sostatt um eina yvirtøka sum bert í avmarkaðan mun ávirkar marknaðarstøðuna hjá P/f Bakkafrost á viðkomandi marknaði.

---

[1] K600-2009036: Samanlegging av P/f Bakkafrost og Vestlax Holding
[2] 11/00098: Avgerð um yvirtøkuna hjá P/f Bakkafrost av P/f Havsbrún

Kappingareftirlitið

Talan er um eina yvirtøku, sum kemur undir §3, stk. 1, nr. 4 í reglugerð nr. 2 frá 20 juli 2012, og er tí fráboðað eftir einfaldum leisti. Við støði í teimum upplýsingum sum fráboðari er komin við, metir Kappingareftirlitið, at yvirtøkan ikki gevur orsøk til ivasemi, og hevur tí avgjørt at góðkenna yvirtøkuna eftir §15, stk. 5 í kappingarlógini.

Góðkenning er givin treytað av, at tær upplýsingar sum luttakandi fyritøkurnar hava givið eru rættar, sbrt. §18a, stk. 3 í kappingarlógini.

Vegna

Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson
deildarstjóri

Sigurd Rasmussen
fulltrúi